## Ung siga frá álvarsomum upplivingum

**- Hetta er heilt ótrúliga gott tilfar -sannar gullperlur, sigur Tóra Petersen, sálarfrøðingur, um góðu og erligu frágreiðingarnar, hon hevur fingið frá ungum, ið hava verið fyri álvarsomum hendingum. Í dag fingu bestu høvundarnir virðislønir**

KAPPING
*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*

Seks ung fólk fingu í dag heiðurslønir handaðar fyri teirra íkast til eina skrivikapping, um ungfólk og sálarliga svárar hendingar. Stílarnir snúðu seg um alt frá krabbameini til incest, og vóru ótrúliga góðir, rámandi og lýsandi.
Tað er Tóra Petersen, ið er sálarfrøðingur, ið tók stig til kappingina.
- Tað er nógv tilfar um, hvussu fólk hava tað, tá tey hava verið fyri álvarsomum hendingum. Men tað hevur altíð manglað tilfar, sum er komið frá teimum ungu sjálvum. Og nú hava vit umleið 70 stílar, har tey ungu veruliga sleppa at greiða frá, hvussu tey hugsa, tá tey koma út fyri onkrari svárari hending, greiðir Tóra Petersen frá.
- Hetta er ótrúliga viðkomandi, tí tað kemur greitt fram av hesi skrivikappingini, hvussu torført tað er hjá teimum ungu at biðja um hjálp. Tey hava tað ofta inni í sær sjálvum, og summi fara at drekka ella taka stoffir, ístaðin fyri at tosa um tað og fáa hjálp.
Tóra heldur, at hetta er ein góð grund at byggja á, tá umstøðurnar hjá teimum ungu skulu bøtast.
- Álvarsamar hendingar geva álvarsamar trupulleikar. Um tey ungu ikki fáa høvi at tosa um tað, so er tað heilt vist, at tað kemur aftur um brekku seinni í lívinum. Tað hevur tí stóran týdning at hjálpa teimum beinanvegin, vísir Tóra á.

*Lesi meira á síðu 50*

# Steinur knústi forrút á koyrandi bili





*Stóri steinurin hevði so stóra ferð, at hann sorlaði passagersetrið sundur og endaði á baksetrinum. Lukkutíð stóðst ongin mannaskaði av hendingini*

**Tað kundi verðið álvarsamur skaði, tá ein stórur steinur brádliga knústi forrútin á einum bili, ið sunnudagin kom koyrandi á hálsinum omanfyri Sandavág. Til alla lukku rakti hann høgra forsetur, har eingin sat**

ÓHAPP
*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*
*myndir: Jens Kristian Vang*

Sosialurin hevur tosað við føraran, sum tó ikki ynskir at standa fram.
Bilførarin greiðir frá, at hann júst hevði verið og sett ein mann av í Miðvági og var á veg ímóti undirsjóvartunnlinum aftur, tá ein stórur steinur kom bóltandi oman líðina á hálsinum omanfyri Sandavág.
Førarin, sum koyrdi umleið 90 km/t, sá ikki steinin koma bóltandi, og skelkurin var tí sera stórur, tá stóri steinurin brádliga knústi forrútin, rakti passagersetrið og endaði á baksetrinum. Førarin greiðir frá, at hann einki vardi. Brádliga var eitt øgiligt buldur, tað rykti í bilin, og tá sá hann steinin liggja á baksetrinum. Alt hendi so skjótt, at hann ikki náddi at hugsa fyrr enn aftaná.
Steinurin rakti í ovara hornið, høgrumegin á forrútinum. Ferðin hevur verið øgilig, tí rygglenið á setrinum brotnaði og endaði afturi á baksetrinum saman við steininum.
Bilførarin var, sum vera man, sera skelkaður av tilburðinum, men hann var einsamallur á vegnum. Eingin annar bilur kom framvið, sum til bar at biðja um hjálp frá, so hann helt tí leiðina fram til hús.
Av tí at forrúturin hevur ein serligan film, sum ger, at glasið ikki splintrast, bar til at koyra víðari. Men hann koyrdi við einum stórum holi í forrútinum.
Bilførarin sigur við Sosialin, at hann er sera skelkaður. Eingin fekk skaða, men ein maður hevði jú sitið í setrinum beint frammanundan, og steinurin kundi tað sama troffið føraramegin. Bilførarin er sannførdur um, at hvørgin teirra hevði komið frá tí við lívinum, tí steinurin kom við so stórari megi.
Hóast bilførarin hevur fingið skelk, og bilurin er illa farin, so er tað gleðiligt, at eingin mannaskaði hendi. Tí tað kundi eins væl verið ein vanlukka.



*Førarin hevði júst sett ein mann av og var á veg heim aftur, tá óhappið hendi. Hevði maðurin sitið í bilinum, hevði hann neyvan komið livandi frá tí*